

# Leys størv í Tórshavnar kommunu

## Pedagogur til Dagstovnin á Hamrinum

Søkt verður eftir einum **pedagogi** til barnagarð, fyri pedagog í barnsburðarfarloyvi, at arbeiða 37 tímar um vikuna at byrja 8. juni 2009. Farloyvistíðin er fyribils fram til 31. januar 2010.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera hjá Dagstovninum á Hamrinum, Glyvursvegur, 160 Argir, í seinasta lagi mánadagin 18. mai 2009.

**Nærri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Elisabeth Henriksen, stovnsleiðara ella Maibritt Simonsen, varaleiðara, á telefon 32 20 03 / 22 57 84, ella við at vitja heimasíðu okkara: www.123hjemmeside.dk/dag-ham

## Pedagogur til Býlingshúsið inni á Gøtu

Søkt verður eftir einum **pedagogi** til vøggustovu at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 1. juni 2009 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera hjá Býlingshúsinum inni á Gøtu, Ovaragøta 30 B, 188 Hoyvík, í seinasta lagi mánadagin 18. mai 2009.

**Nærri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Poulu Ejdesgaard, stovnsleiðara, telefon 31 77 01.

Tórshavnar kommuna

TINGHÚSVEGI 64 • FO-100 TÓRSHAVN • TLF. +298 356610 • FAX +298 356611 • BRL@BRL.FO • WWW.BRL.FO



# Byggifrøðingur, verkfrøðingur ella arkitektur til Brunaumsjón landsins

## Starvið at taka við leiðsluni á Brunaumsjón landsins er leyst at søkja.

**Ábyrgdarøkið**
Ábyrgdin hjá nýggjum leiðara fevnir m.a. um tilbúgving, fyribyrging, váðameting, málsviðgerð, góðkenning, eftirlit, vegleiðing, og annars ásetingum, ið eru fevndir av bruna- og tilbúgvingarlógini. Leiðarin skal hava fakliga vitan á hesum ábyrgdarøkjum.

Tann, ið settur verður, skal halda stovninum á høgum vitanarstøði viðv. fyribyrging, brunatrygd, sløkking, bjarging og tí, ið knýtir seg at hesum.

**Fakligur førleiki**
Sóknast verður eftir fólki, ið hevur hollan kunnleika, starvsroyndir og útbúgving innan m.a.
- kommunala og landsfevnandi tilbúgving,
- brunatrygdarligar byggireglur og brunatekniskar serfyriskipanir um vandamikil evni,
- vanliga og óvanliga byggimálsviðgerð á teim yisku byggiligu økjunum og,
- skal hesin umframt evna at lata stovnsins vitan koma myndugleikum, vinnuvirkjum og almenninginum til kunnleika og gagns.

Dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar, at setti persónurin er fyrikomandi, hevur góð samstarvs-evni, dugir at skipa fyri á arbeiðsøkinum og at taka sjálvstøðugar avgerðir í minni sum stórum málum.

**Setanarviðurskifti**
Løn, viðbøtur og setanartreytir annars, verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkis-felag. Tænastustaðurin er á skrivstovuni í Tórshavn.

Tann, ið settur verður, skal kunna taka við starvinum tann 1. juli 2009.

**Umsóknir**
Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verður at senda til Tilbúgvingarstovn Føroya, Tinghúsvegi 64 Tórshavn, og skal vera skrivstovuni í hendi innan 11. mai 2009. Brævbjálvin eigur at merkjast »Starv á Brunaumsjón landsins«. Stovnurin skilar sær rætt til at velja ein umsøkjara til starvið ella at vraka allar umsóknirnar og at søkja av nýggjum.
Umsóknir, prógv, førleika- og útbúgvingarlýsingar o.a. verða viðgjørd í trúnaði.

Nærri upplýsningar um starvið kunnu fáast frá Petur Olsen, deildarstjóra á tel. 35 66 10 ella 21 50 46. Teldupostur: brl@brl.fo